# Kvinnufótbólturin fór aftur á rull

*Eftir at hava havt summarsteðg, fór kvinnufótbólturin aftur á rull sunnudagin, har bert tveir dystir vóru leiktir*

Heini í Skorini

Eitt umfar varð leikt í endaspælinum hjá kvinnunum áðrenn umfarið sunnudagin, og var tað beint áðrenn summarsteðgin. Tá vann KÍ stórt á HB, meðan B36 og VB vunnu ávikavist á Skála og NSÍ.

Dystirnir hetta vikuskiftið skuldu eftir ætlan vera millum B36-VB, Skála-HB og NSÍ-KÍ, men vegna fólkatrot í Runavík, vóru bert tveir dystir leiktir, og var tað B36 sum tók ímóti VB, meðan HB kvinnurnar løgdu leiðina til Skála.

**Javnt í Gundadali**

VB var sum sagt í Havn og vitjaði B36, og endaliga úrslitið av dystinum gjørdist 1-1. VB kom framum í fyrra hálvleiki, og var tað uppá brotsspark, sum Annika Poulsen tók sær av. Hálvleiksstøðan var eisini 1-0 til VB, men í seinna hálvleiki eydnaðist B36 kvinnunum at fáa týdningarmikla útjavnandi málið, og var tað Elsebeth Jónsson sum javnaði fyri heimaliðið. Dysturin endaði sostatt 1-1, og tað vil siga, at bæði liðini hava fýra stig fyri tveir dystir.

Í løtuni kann sigast, at KÍ verður mettur sum favorittur til føroyameistaraheitið eftir stórsigurin í landskappingini og sigurin í steypafinaluni móti HB, men ein skal heilt avgjørt ikki avskriva lið sum B36 og VB, meðan HB kvinnurnar væntandi eisini vera drúgvar. Spennandi verður at síggja, hvussu B36 og VB fara at fóta sær móti HB og KÍ.

**Eyðvør úr Dímun kom, sá og skoraði**

Ein av Føroya bestu kvinnuligu fótbóltsleikarum er uttan iva Eyðvør úr Dímun. Hon leikar sum kunnugt dagliga í Danmark, men av tí at hon er komin upp í summarfrítíð, var hon við á HB liðnum inni á Skála. Og tá avtornaði hevði hon veruliga víst, at hon ikki hevur gingið fyri einki niðri í Danmark. Dysturin endaði nevniliga 4-0, og Eyðvør skeyt ikki minni enn trý av málunum, meðan stórskjúttin Annika Godtfred syrgdi fyri hinum málinum. Skála gav HB ein lítlan hvøkk, av tí at hálvleiksstøðan var 0-0, men sum sagt megnaði HB at vinna dystin 4-0, og tær fingu sostatt reist seg eftir stórtapið móti KÍ, hóast uppgávan hesaferð ikki kann metast við hana í Klaksvík.

Eyðvør úr Dímun verður verandi til 20. august, og tað vil við øðrum orðum siga, at hon kann vera við móti NSÍ í Havn næsta vikuskiftið, og síðani fær hon eisini verið við til grannauppgerðina móti B36, og tað kann koma at gerast sera avgerandi fyri HB.

Sum sagt varð dysturin millum NSÍ og KÍ útsettur, og ikki er avgjørt enn, nær hesin dystur verður leiktur. Sum heild stendur illa til við fólki inni í Runavík, og óvist er, hvat verður gjørt við henda trupulleika í framtíðini.

Næsta vikuskiftið tekur HB ímóti NSÍ, B36 fer til Klaksvíkar at leika móti KÍ, meðan VB og Skála hittast í Vági.

Úrslitini sunnudagin vóru hesi:

**B36-VB 1-1**
**B36:** Elsebeth Jónsson 1.
**VB:** Annika Poulsen 1.

**Skála-HB 0-4**
**HB:** Eyðvør úr Dímun 3, Annika Godtfred 1.

**Støðan, 1. deild kvinnur**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | B36 | 2 | 1 | - | 1 | - | 0 | 5 | 1 | 4 | 4 |
| 2 | VB | 2 | 1 | - | 1 | - | 0 | 5 | 3 | 2 | 4 |
| 3 | KÍ | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 8 | 0 | 8 | 3 |
| 4 | HB | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 4 | 8 | -4 | 3 |
| 5 | NSÍ | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 2 | 4 | -2 | 0 |
| 6 | Skála | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 0 | 8 | -8 | 0 |

**Máltindurin**

| | | |
|---|---|---|
| Rannvá Andreasen | KÍ | 4 |
| Guðrun í Lágabø | VB | 4 |
| Eyðvør úr Dímun | HB | 3 |
| Sólvá Joensen | B36 | 2 |
| Malena Josephsen | KÍ | 2 |
| Elsebeth Jónsson | B36 | 1 |
| Maria Vang | B36 | 1 |
| Sólgerð Viderø | B36 | 1 |
| Annika Godtfred | HB | 1 |
| Margit Joensen | KÍ | 1 |
| Ragna Andreasen | KÍ | 1 |
| Irdi Hansen | NSÍ | 1 |
| Maibritt Olsen | NSÍ | 1 |
| Annika Poulsen | VB | 1 |

adidas

# Stuðulsfólk hjá B36 fara til AB

*Talan er tó ikki um nakra útferð til Argir, men hinvegin um viðhaldsfólk hjá B36, sum ætla sær á Gladsae Stadion, tá B36 fer at royna seg í Europa Cup*

At teir í B36 hildu seg vera hepnar, tá lutur varð kastaður um europeisku mótstøðuna, mundi ikki vera nakað loyndarmál, tá lutakastið hevði verið.

Bæði fíggjarliga og ítróttarliga hildu teir tá, at hetta var eitt gott lutakast, og líkt er til, at soleiðis er eisini hjá áskoðarunum.

**Við bussi um Noreg**

Verður áhugin nóg stórur, ætlar Kári Enghamar, sum eigur og rekur Bussferðir, at skipa fyri eini ferð til dystin.

Lýst hevur verið í bløðunum, og í løtuni verður so bara bíðað eftir, um nóg nógv tekna seg.

Talan er um fráferð úr Føroyum Føroyum mánadagin, tá Norrøna leggur frá landi við kós móti Noreg. Úr Bergen verður koyrt suður gjøgnum Noreg og Svøíki, og umvegis tunnillin og brúnna gongur leiðin so til Keypmannahavnar. Sostatt skuldi verið gjørligt hjá áskoðarunum at veri væl og virðiliga upphitaðir, tá dysturin verður blástur í gongd. Kostnaðurin fyri ferðina er knappar 4.000 kr., og er tá íroknað ferðing og gisting.

Tilmeldingarfreistin til ferðina var úti í gjár, hósdagin, eftir at blaðið var farið til prentingar, so ikki fekst at vita, um nóg nógv høvdu teknað seg. Sum skiltist á Kára Enghamar, so hevði áhugin fyri ferðini verið stórur.

Umframt at Bussferðir skipar fyri ferð til dystin, so tykist tað eisini, at áhugin fyri dystinum er stórur millum føroyskar útisetar.

Í øllum førum ber til at bíleggja sær atgongumerki til dystin í Føroyahúsinum á Vesterbrogade.





# Landsliðið úttikið

*Landsliðsvenjarin Allan Simonsen hevur tikið 18 spælarar út til landsdystin móti Danmark*

Stefan í Skorini

Allan Simonsen hevur gjørt av, hvørjir leikarar skulu við í hópin til dystin ímóti Danmark, sum verður 16. august kl. 18.45 á Tórsvølli.

Spælararnir eru: Johannes Joensen, Allan Mørkøre HB, Henning Jarnskor GÍ, Øssur Hansen, Fróði Benjaminsen, Jan C. Dam B68, Jens Kristian Hansen B36, Rógvi Jacobsen KÍ, Jens Martin Knudsen, Sámal Joensen, John Petersen Leiftur, Óli Johannesen AGF, Todi Jónsson FCK, Julian Johnsson, Kurt Mørkøre, Hans Fróði Hansen Sogndal, Uni Arge ÍA, Jákup Mikkelsen Herfølge.

Hetta er stórt sæð tann sami hópurin, sum var niðri á La Manga fyrr í ár. Tó er toppskjúttin í føroysku 1. deild tvey tey seinastu árini, Jákup á Borg, ikki tikin við av landsliðsvenjaranum.

Tey feløgini, ið eru best umboðað á føroyska landsliðnum, eru B68, Leiftur og Sogndal, sum øll hava tríggjar spælarar við í hópinum.

Tað sær út til, at Kurt Mørkøre hevur bitið seg fastan aftur á landsliðnum, eftir at hann hevur havt ein langan sjálvvaldan steðg í landsliðshøpi. Hann var við seinastu ferð, landsliðið varð savnað, niðri á La Manga, og toppskjúttin hjá Sogndal, Kong Kurt, er eisini við í hópinum móti Danmark.

Allan Simonsen ger sjáldan nakrar kollveltandi broytingar, og so er eisini hesuferð. Eingin nýggjur spælari sleppur at royna seg, men ein spælari sum Andrew av Fløtum kundi kanska komið uppá tal til landsliðið, eftir tað spæl, sum hann hevur víst í fyrru hálvu av landskappingini. Tað er tó torført at skumpa nakran av tungvektarunum í álopinum av liðnum, og sjáldan eru fleiri enn tríggir áleyparar við í hópinum.



*Meðan Poul Michelsen og hansara menn fyrireika Tórsvøll til komandi uppgávurnar, hevur Allan Simonsen gjørt av, hvørjir menninir skulu vera, sum skulu hjálpa honum í at basa landsmenn sínar*

***Mynd: Jonhard Hammer***

# Hvessingur varð nr. 2

*Rætting ti grein um ólavsøkukapproðurin*

Jákup Mørk

Eins og vanligt er eftir ólavsøku, so høvdu vit aftur í ár frásøgn frá FM-róðrinum, sum jú er eitt av hæddarpunktunum á ólavsøkuni.

Tíverri var ein villa í greinini um róðurin hjá 6-mannaførum við kvinnum.

Har stóð at lesa, at Lómur vann kappingina um næstfremsta plássið, í harðari kapping við tær á Páll Fanga.

Hetta er sjálvsagt ikki rætt. Talan var hinvegin um, at Hvessingur vann silvurmerkini í kapping við Lóm, og at Páll Fangi síðani kom inn sum nummar 4.

Rætta úrslitið av róðrinum framgekk tó av úrslitalistanum í blaðnum, og verður hesin endurprentaður niðanfyri.

Vit biðja genturnar umborð á Hvessingi orsaka okkum mistakið, og nýta samstundis høvið til at ynskja teimum tillukku við silvurmerkjunum. Bæði á ólavsøku og í FM-kappingini.

**FM róður á ólavsøku, úrslit:**

**6-mannafør, kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Jarnbardur | 4.59,03 |
| 2 | Hvessingur | 5.03,00 |
| 3 | Lómur | 5.03,07 |
| 4 | Páll Fangi | |
| 5 | Gongurólvur | |
| 6 | Fuglfirðingur | |
| 7 | Riddarin | |
| 8 | Sølmundur | |

# Sóljan brynjar seg við litavum

*- Eingin møguleiki er at klára seg í 1. deild uttan styrk uttanifrá, sigur Allan Nielsen formaður í hondbóltsnevndini hjá Sóljuni*

Stefan í Skorini

Sóljan úr Vágunum tryggjaði sær seinasta kappingarár uppflyting til 1. deild hjá kvinnum í hondbólti, og tær hava ikki ætlanir um at fara beina leið niðuraftur í 2. deild. Nevndin í Sóljuni arbeiðir tí í løtuni við at fáa tveir litaviskar leikarar hendavegin. Enn er einki komið uppá pláss viðvíkjandi sáttmálum og tílíkum, men væntandi er, at leikararnir spæla við Sóljuni komandi kappingarár.

Samstarvið er komið í lag gjøgnum ein av teimum litavisku fótbóltsspælarunum, sum spæla við FS Vágum.

**Eingin møguleiki uttan**

Allan Nielsen sigur, at um Sóljan ikki skal fara beina leið niðuraftur í 2. deild, so er hetta eitt neyðugt stig at taka.

Talan er um ein 19 ára gamlan útispælara og ein 21 ára gamlan málverja, sum skulu styrkja um liðið hjá Sóljuni í ár. Tann eldra, sum er málverji, skal verða spælandi venjari, meðan hin bara skal spæla við á liðnum.

Tað sigst, málverjin hevur verið uppá tal til litaviska landsliðið, men enn hevur hon ikki leikt nakran landsdyst.

**Nógvir útlendingar**

Útlendskir leikarar hava veruliga gjørt innrás í føroyskan ítrótt í seinastu árini, og tað sær ikki út til, at innflutningurin av útlendskum ítróttarfólki fer at minka. Serliga eru tað fólk úr Eystureuropa, sum hava hug at koma hendavegin, og Sóljan gagnnýtur nú eisini henda møguleikan. Fleiri av hesum ítróttarfólkum hava eisini roynst sera væl í Føroyum.

Fótbólts- hondbólts og flogbóltsspælarar úr øðrum londum seta nú sín dám á føroysku kappingingarnar. Hetta kann verða óheppið fyri okkara yngru leikarar, sum verða settir afturum útlendingarnar og harvið ikki fáa møguleikan at royna seg á besta liðnum.

## Hópsigling av Eiði til Havnar í dag

Stefan í Skorini

Í sambandi við at tað eru 20 ár síðani, at Róðrarsamband Føroya varð stovnað, verður ein hópsigling fyriskipað, har bæði róðrarbátar, seglbátar og maskinbátar koma at luttaka. Lagt verður frá landi av Eiði fríggjakvøldið 4. august kl.19. Ætlanin er at verða í Hósvík umleið kl. 23.30, har okkurt verður at fáa til matna, somuleiðis sum skipað verður fyri dansi í bygdarhúsinum, har Bjørn Djurhuus Band kemur at spæla. Bátarnir leggja frá landi aftur úr Hósvík leygarmorgunin kl. 11, og komið verður til Havnar umleið kl.15. Áðrenn siglt verður inn á Havnarvág, verður bátafylgið bólka upp, soleiðis at bátarnir koma inn í skipaðari raðfylgju. Harmoni orkestrið GHM fer at spæla í Vágsbotni, tá ið bátarnir koma til bryggju.

Í Havn fyriskipa róðrarfeløgini Knørrur og Argja Róðrarfelag fyri ymiskum tiltøkum so sum rógving fyri børn, har verður hoppiborg, søla av pylsum v.m. Um kvøldið verður túnadansur í teltinum, sum verður uppsett á Skálatrøð, har Bjørn Djurhuus Band fer at spæla til dans.

69 bátar hava boðað frá luttøku við tilsamans 390 fólkum umborð.

# Herfølge møtir Rangers

*Tað er nú greitt, at Herfølge skal spæla ímóti Rangers, og felagið arbeiðir í løtuni við at fáa ein fyrrverandi spanskan landsliðsspælara til Herfølge*

Stefan í Skorini

Skotska meistaraliðið Glasgow Rangers spældi mikukvøldið javnt 0-0 ímóti litaviska liðnum Zalgiris Kaunas. Rangers vann fyrra dystin 4-1, so teir eru nú til reiðar at taka ímóti Herfølge í næsta umfarinum av kvalifikatiónini til Champions League. Tað liðið, sum vinnur tann dystin, fer víðari til bólkaspælið í Champions League, har nógvur peningur er at fáa.

Fyrsti dysturin teirra millum verður á Herfølge Stadion týsdagin 8. august, og tann seinni dysturin verður spældur tvær vikur seinni. Brøndby hevur eisini spælt seg víðari, tá teir bastu íslendska liðnum KR. Eisini teir fáa sera stinna mótstøðu, tí teir skulu møta Hamburger SV í næsta umfarinum.

**Herfølge fær spanskan landsliðsspælara**

Fyri stuttum misti Herfølge miðvallarleikaran Jens Madsen til Grikkalands. Hetta var ein dyggur smeitur, tí hann hevur havt ein týðandi leiklut á liðnum.

Nú er líkt til, at Herfølge fær ein annan spælara úr Grikkalandi. Talan er um Thomas Christensen, sum hevur verið og royndavant í eina viku. Venjarin John Faxe Jensen er so áhugaður í honum, at hann hevur boðið honum ein sáttmála. Thomas Christensen hevur ikki tikið av enn, men partarnir fara at samráðast um ein sáttmála.

27 ára gamli Thomas Christensen hevur danskar røtur, men hevur spanskan statsborgararætt. Hann hevur spælt við spanska stórfelagnum Barcelona, og eisini hevur hann roynt seg á spanska landsliðnum. Annars hevur hann spælt við Sporting Gijon og Oviedo í Spania, B93 í Danmark og seinast við Panionios í Grikkalandi.